LM-073/2023

UMHVØRVISMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Environment

Uttanríkis- og Vinnumálaráðið
Tinganes
100 Tórshavn

Tórshavn, tann 14. november 2023
J. nr.: 23/19092-4
Viðgjørt:
Tygara skriv: 23/02957

Hoyringssvar í sambandi við broytingar í sjólógini og øðrum lógum í sambandi við yvirtøku av málsøkinum sjórættur o.a.

Umhvørvismálaráðið metir tað hava týdning sum skjótast at fara undir arbeiðið at lýsa, hvørjar fyrisitingarligar og fíggjarligar avleiðingar yvirtøkan av sjórættinum hevur fyri føroyska sjóvinnuumsiting í breiðari merking.

Føroyar hava nógvar altjóða skyldur sum flaggland, t.e. føroyska skipaskrástingin og FAS, sum havnastatur í umsiting, eftirliti og handhevjan av altjóða sum nationalum reglum og sum strandaland. Umráðandi er, at uppgávu- og ábyrgdarbýtið millum fyrisitingarligar myndugleikar er væl lýst og at málsøkini verða skynsamliga býtt millum landsstýrisfólkini, so markamótini eru so eintýðug, sum til ber.

Umhvørvismálaráðið metir tað eisini hava týdning, at sjóvinnuumsitingin verður raðfest fíggjarliga og umsitingarliga, so altjóða luttøka, førleikamenning av starvsfólkum og samskipan kann gerast ein eyðsýndur partur av føroyskari sjóvinnuumsiting frameftir til gagns fyri vinnuna, fyrisitingina og fyri umdømi Føroya sum framkomin sjóvinnutjóð.

Vegna Umhvørvismálaráðið

Anni á Hædd